# Fabregas klárur til Roma

Síðani desember mánað hevur spanski stjørnuspælarin Cesc Fabregas ikki spælt vegna knæskaða, men nú er ljós fyri framman. Læknar siga nú, at Fabragas møguliga kann verða klárur at spæla aftur, tá ið Arsenal skal hitta AS Roma í Champions League síðst í hesum mánaðinum. Sambært læknunum hevur tað gingið skjótari enn vænta at fáa bilbukt við knæskaðan hjá Fabregas.




# Keane gevur heiðursmerki burtur

Robbie Keane hevði eitt misneydnað ævintýr í Liverpool, og nú er hann aftur í Tottenham, haðani hann kom. Men Keane kann fáa eitt heiðursmerki burtur úr hesum kappingarárinum, um Liverpool endar millum trý tey fremstu. Men tað heiðursmerki vil Keane ikki síggja. - Beiggi mín er fjeppari hjá Liverpool, so eg kann forera honum heiðursmerkið. Eg vil ikki hava hana, tí eg eri ikki longur partur av Liverpool-liðnum, sigur Keane við Sportinglife.



*Longu leygardagin gjørdust fuglfirðingar meistarar uttan at spæla, men við sigri á Fleyr sunnudagin staðfestu teir støðuna sum besta flogbóltsliðið hetta kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ÍF eru meistarar

**SÍ tveitti sín møguleika burtur leygardagin, og sunnudagin kundu fuglfirðingar sláa fast, at teir eiga føroyameistaraheitið í mansflogbólti**

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Sæð burtur frá fyrsta dystinum ár, tá ÍF tapti 3-1 móti SÍ, hava fuglfirðingar ikki verið til steðga í ár.

Tí var eisini nógv, sum bendi á, at meistaraheitið skuldi koma hús longu á trið seinasta leikdegi, tá ÍF skuldi til Havnar at spæla móti Fleyr, sum als ikki hevur fingið glið á sítt spæl seinasta partin av kappingini.

ÍF hevði ársveitslu um vikuskiftið, og longu á veitsluni stóð greitt, at meistaraheitið var í hús. SÍ var nevnliga við undirlutan, tá teir vitjaðu hjá Mjølnir, og so var matematiska vissan longu í rættlag undan dystinum hjá ÍF sunnudagin.

Men tað forðaði nú ikki fuglfirðingum í at gera bart í Havn. Við 3-1 sigri staðfestu fuglfirðingarnir, at teir verða ikki tiknir í ár, og so er spurningurin bara, um tað eisini verður til greipusigur til fuglfirðingar, sum komandi leygardag spæla steypafinalu.

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 16 | 14 | - | 2 | 45 | 21 | 24 | 17 |
| 2 | Fleyr | 15 | 10 | - | 5 | 34 | 22 | 12 | 13 |
| 3 | Mjølnir | 15 | 9 | - | 6 | 28 | 25 | 3 | 10 |
| 4 | Dráttur | 15 | 8 | - | 7 | 33 | 28 | 5 | 9 |
| 5 | ÍF | 14 | 7 | - | 7 | 27 | 25 | 2 | 8 |
| 6 | KÍF | 16 | 5 | - | 11 | 27 | 38 | -11 | 7 |
| 7 | TB | 15 | 0 | - | 15 | 4 | 45 | -41 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 9 | - | 1 | 29 | 11 | 18 | 13 |
| 2 | SÍ | 10 | 5 | - | 5 | 21 | 19 | 2 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 10 | 3 | - | 7 | 15 | 26 | -11 | 6 |
| 4 | Mjølnir | 10 | 3 | - | 7 | 14 | 23 | -9 | 3 |

## Úrslitini

**Eik-liga, kvinnur**

Mjølnir-SÍ 2-3 (20-25, 25-21, 25-27, 25-23, 11-15)
KÍF-Fleyr 1-3 (19-25, 25-20, 17-25, 22-25)

**Eik-liga, menn**

Mjølnir-SÍ 3-1 (24-26, 25-23, 25-18, 25-22)
Fleyr-ÍF 1-3 (23-25, 16-25, 25-23, 14-25)


